## Sct. Brigid Ale




Eisini ein av nýggjaru ølunum úr Klaksvík. Her hava vit við nakað heilt serligt at gera. Ein super góð øl, allan vegin framúrskarandi og serstakliga spennandi. Her er veruliga talan um frambrot og nýggjan av ølúrvalinum. Her er veruliga pjøssað um smakknuansunum, og tað er til fulnar eydnast at framleiða eina nýggja og øðrvísi øl. Ølið er ikki filtrerað, so minst til at fáa botnfallið við. Tað er har, vitaminirnar eru, sum eg plagi at siga. Men tað liggja veruliga nakrar smakknuansir har, so tað er bara meiri rættvíst fyri ølið, at fáa tað við eisini. Talan er eisini um flott skúm, ið eggjar til njótan. Ein ótrúliga flott øl, framúr lit og ein heimssmakk, ið leiðir tankarnar til gott, belgiskt øl. Her er ein øl, ið bryggjaríið veruliga kann byggja víðari uppá. Ein øl, sum í okkara meting fær toppkarakter.

*Her skal viðmerkjast, at Føroya Bjór í løtuni ikki bryggjar Sct. Brigid Ale*

## Ydun




Hvat er hetta fyri nakað... Øl við rabarbum í. Ein stuttligur flottur litur, mestsum reyður – rosé-reyður eins og rosé vín. Og kanska hugsaðu vit um vín, tá vit smakkaðu ølið. Ølin hevur eitt flott skúm sum lok omaná reyða ølið. Tað er ikki til at vita, hvussu hendan ølin verður móttikin av brúkarunum. Tað virkar fyri okkum, sum ein ógvuliga spennandi summarøl. Vit hugsa okkum, at hon er sera leskilig sum ein svalandi uppfrískan. Men sjálvt ølið hevur ein góðan smakk. Har er eitt dism av frukt, ikki gjøgnumtreingandi, og ikki soleiðis, at hon smakkar av rabarbum, men eitt dism av fruktum. Vit hava einki sum so at seta niður á smakkin, hann er bara øðrvísi. Og um summarið, tá sólin stendur høgt, vilja vit fegnir njóta eina Ydun.

**ØÐRVÍSI**

## Organic




Hetta er ein heilt nýggj øl. Ein ljós, økologisk øl. Tað er ikki rættvíst at njóta eina slíka øl beint eftir øðrum ølsløgum, ið hava munandi meiri smakk. Hon kann virka eitt sindur tunn, men vit halda avgjørt, at hetta er ein útmerkað frokostøl við lágum alkoholprosenti. Ein summarøl, ið sløkkir tostan. Men hon skal drekkast køld. Eitt gott alternativ, um tú skal koyra bil, ella bara ert tystur og vil drekka góðsku.

## Slupp




Eisini ein øl, ið eg fyrr havi smakkað. Men hon er heilt greitt eisini ein av favorittunum. Ein traditionell øl við góðum rávørum og bara tað. Einki við kaffi og lakres sum smakkískoyti. Tað er humla og malt, ið gevur smakkin. Ein deiliga full øl, sum ongantíð verður keðilig. Avgjørt ein øl, ið ikki má strikast úr úrvalinum, hóast hon hinvegin ikki er nøkur kollvelting. Men ein flott øl við fullum smakki, flott skúm og fínan eftirsmakk.

## Green Island




Hetta er helst ølin, ið mær dámar best. Fyri mær er hetta tindurin av Norðuratlantiskum øl. Her hava tit rakt nakað, sum fyri mær er ovast á listanum. Hetta er ein sterk og myrk øl við einum serstakliga fullum smakki. Rund og leskilig. Ein øl, ið er merkt av serstakliga mongum smakknuansum, og sum bryggjaríið skrivar á heimasíðu síni, so er søtleiki við einum dismi av kaffi, sjokolátu og lakres í ølinum. Ein øl, ið kann drekkast árið runt í góðum vinalag. Ein veruliga leskilig øl, sum gevur njótan út um øll mørk.

**BEST**

## Jólabryggj




Vit kenna hesa ølina fyri nakað gott, nevniliga frá jólabryggj smakkingunum í Selskab for Vestjysk Ølkultur. Hetta er ein frálík øl, sum okkum dámar sera væl. Hon hoyrir upp í partin av sterkaru føroysku ølunum. Vit hava lagt til merkis, at hon ikki liggur so ovarliga í jólabryggj smakkingini seinnu árini, og vit halda kanska eisini, at smakkurin seinnu árini er broyttur – kann tað veruliga verða so? Tá hevði kanska verið eitt hugskot at hugt eftir gomlu uppskriftini. Men tað er heilt greitt ein øl, sum vit kunnu rósa. Talan er um eina góða, sterka øl. Hon fyllir væl í munninum, kanska kundi hon skúma heldur meir. Hevur sera vakran lit, og smakkar av einari aftrat.